# Føroyar fingu ein frammaná



*Tað vóru ofta nógvir onglendingar rundanum føroysku spælararnar*

**Tað var klassamunur, tá ið Ongland setti føroysku U 17 unglingarnar upp á pláss við 7-0 stórsigri, men møguleikin er framvegis at sleppa undan aftastu plássunum**

U 17 NM

*Jóannes Hansen*

Seinnapartin í dag fer føroyska U 17 landsliðið í fótbólti at spæla móti Finnlandi. Stríðið verður um at sleppa undan aftasta plássinum í bólkinum. Um tað eydnast Føroyum at megna í minsta lagið javnleik, so skulu Føroyar sunnudagin spæla um fimta plássið.

- Men tað verður torført. Eingin ivi er um, at finnarnir fara at vera ógvuliga uppsettir, eftir at teir bæði hava tapt móti Onglandi og Svøríki, heldur Finn Johannesen, sum er føroyski hjálparvenjarin í Reykjavík.

Eftir góða úrslitið týsdagin - 1-1 móti Svøríki - kom føroyska liðið orduliga niður á jørðina mikudagin. Tá var Ongland mótstøðuliðið, og tá var einki at rafla um. Ongland vann 7-0, eftir at teir eftir fyrstu fjøruti minuttirnar vóru frammanfyri við tveimum málum.

Ongland setti beinanvegin Føroyar undir stórt trýst. Í 14. minutti eydnaðist ikki at fáa bóltin burtur eftir innlegg og so var 1-0. Fýra minuttir seinni varð 2-0. Málverjin koppaði einum av teirra, og teir fingu mál burturúr brotssparkinum.

- Hóast teir vóru frammanfyri við tveimum málum, so var leikliga avrikið hjá okkum kanska betri, enn tað var móti Svøríki. Men í 2. hálvleiki var klassamunur. Ter fingu mál eftir 48, í 53. og í 55. minutti, so vóru vit heilt moyrir, og teir skoraðu tvey mál afturat, greiðir Finn Johannesen frá.

Mikukvøldið sóu føroyingarnir hálvfinaluna í steypakappingini millum Fram og FH, sum Fram vann 9-8 eftir longda leiktíð og brotssparkskapping.

- Í morgun fara vit at venja og at royna at fáa liðið upp á pláss aftur eftir henda umgangin, og so fáa vit at síggja, hvussu tað verður móti Finnlandi. Eisini fara vit at vitja Bláa Lónið, sigur Finn Johannesen úr Reykjavík.

Svøríki vann mikudagin 3-0 á Finnlandi. Í hinum bólkinum vann Danmark 3-0 á Noregi og Írland vann 2-0 á Íslandi.

Føroyska liðið: Jóan Pauli Jakobsen, B36 - John Hammer, KÍ (Rógvi Holm, AB, 80.), Ari Samson, KÍ, Torkil Kollsker, HB, Heri Nesá, ÍF (Rúnar í Lon Jacobsen, B36, 41.) - Álvur Christiansen, KÍ (Martin Tausen, VB, 56.), Filip Jacobsen, NSÍ, Henning Joensen, liðformaður, VB, Rógvi Poulsen, AB (Eli Simonsen, KÍ, 60.),- Johan Ellingsgaard, B36.) - Klæmint A. Olsen, NSÍ (Vincent Jacobsen, ÍF, 22.)

Á beinkinum uttan at verða skiftir inn vóru Hans Jørgensen, KÍ, og Rasmus Nielsen, B71. Pætur Clementsen er venjari, og Finn Johannesen er hjálparvenjari. Andrass K. Thomassen er liðleiðari, Fanny Kruse fysioterapeutur og Rúni Heinesen er ferðaleiðari.

# Start mist í toppinum

**Summir serfrøðingar siga seg ivast í, um felagið hjá Toda Jónsson fer at megna at halda tørn um oddasessin, sum teir hava sitið á størsta partin av kappingarárinum**

NOREG

*Jóannes Hansen*

Start er framvegis oddalið í norskum fótbólti. Men mikukvøldið versnaðu fyritreytirnar hjá teimum. Viking, sum Start mánakvøldið skal spæla móti í Stavanger, tapti 2-0 á útivølli móti Lillestrøm, so sammett við Viking styrknaði støðan hjá Start.

Størsta hóttanin fer ivaleyst at koma frá Vålerenga. Teir í Oslo felagnum vóru mikukvøldið upptiknir av europeisku meistarakappingini, har teir á útivølli móti Haka í Finnlandi, sum áður hevur spælt móti HB, tryggjaðu sær sess í triðja innleiðandi umfarinum.

Tí var heimadysturin hjá Vålerenga móti Molde útsettur. Oslo felagið er fýra stig aftanfyri Start, men teir hava spælt ein dyst minni.

Í Noregi verður nógv tosað um, um tað man fara at eydnast Start at halda tørn um oddasessin. Fleiri serfrøðingar siga seg rokna við, at tað fer Start ikki. Teir rokna við, at Vålerenga fer at vinna meistaraheitið.

Eftir dystarlok í Kristiansand helt Lyn venjarin, Henning Berg, sum er gamal Manchester United verjuspælari, at hansara lið hevði verið ógvuliga heppið at fáa eitt stig. Sjálvandi iðraði hann seg um, at tað í evstu løtu var eydnast Toda Jónsson at fáa mál, og at liðið hjá honum harvið hevði mist tvey stig, men hann helt, at Start stóran partar av tíðini hevði rundbarberað teir, sum hann tók til.

Karismatiski Odd Nordlie, sum er venjari hjá Start, segði seg vera væl nøgdan við leikliga avrikið, og hann segði seg ikki ivast í, at teir fóru at megna at halda tørn um oddasessin, um teir framvegis fóru at megna hetta leikliga støðið.

Trettan tey seinastu árini hevur Rosenborg verið meistari. Tað verða teir ikki í ár. Tað er rættulig kreppa í Tróndheimi. Mikukvøldið var Rosenborg á útivølli móti Fredrikstad, sum var fyrsta felagið í Noregi, sum ætlaði at keypa Toda Jónsson. Meistaraliðið varð fullkomuliga eyðmýkt. Fredrikstad vann 5-1!

# Føroyar eiga álopsspælara á altjóða støði

**Todi Jónsson sannførdi mikukvøldið við landsliðsvenjaranum sum eygnavitni, at hann eigur at vera hvassasta vápnið, tá ið Kypros skal fellast**

ÚTISETI

*Jóannes Hansen*

Í nýggja gula og svarta búnanum sannførdi Todi Jónsson mikukvøldið allar fótbóltsáhugaðar føroyingar um, at hann framvegis er besti álopsspælarin, sum Føroyar hava átt og ikki minst framvegis eiga. Hóast hann leygarmorgunin var úti fyri stórum skelki og endaði á sjúkrahúsinum, so var Todi ógvuliga væl fyri, tá ið Start á heimavølli royndi at verja oddasessin í Tippuliguni móti Lyn úr Oslo, sum eigur bestu verjuna í norskum fótbólti. Annar av miðverjunum var Steven Lüstu, sum var á Herfølge liðnum, tá ið teir við Jákupi Mikkelsen sum málverja vunnu DM í 2000.

Undan vitjanini hjá Lyn í Kristiansand vóru trettan mál farin ígjøgnum í fimtan dystum, og inntil vísarin var farin tríggjar minuttir út um vanligu leiktíðina, tóktist tað sum um, at tað skuldi eydnast høvuðsstaðarfelagnum at fara avstað við ongum máli ímóti sær og øllum stigunum, eftir at teir í 1. hálvleiki høvdu fingið eitt mál eftir horna.

Men so var tað, at Todi Jónsson var nógv hægstur og við rimmar stútara staðfesti, at tað framvegis býr nógv krút í honum.

- Tað var fantastiska gott, at eg skoraði. Fyri liðmoralin hevði tað verið ógvuliga tyngjandi, um vit einki høvdu havt fingið burturúr. Vit høvdu stóra leikliga yvirvág, og vit høvdu einar fjúrtan góðar royndir móti málinum. Eisini fyri meg persónliga kom málið væl við. Eg veit væl, at eg eri keyptur fyri at skjóta mál, og tað er á tí vágskálini, at eg verði vigaður, so hetta var fantastiskt, sigur Todi Jónsson, sum iðrar seg um, at hann ikki fekk eitt mál afturat.

- Í 1. hálvleiki hevði eg ein góðan møguleika eftir innlegg. Tá fór bólturin dygst skeivu megin stólpan. Tá átti eg at havt sent hann í málið við høvdinum. Tá ið tað restaði ein løta, og vit framvegis vóru aftanfyri, fekk eg bóltin í málið. Tíverri var eg akkurát rangstaddur.

Henrik Larsen, landsliðsvenjarin, var á áskoðaraplássunum í Kristiansand mikukvøldið, og hann heilsaði eftir dystarlok upp á Toda:

- Tað er upp til hansara at gera av, um eg skal spæla á landsliðnum ella ikki. Hann helt, at eg hevði spælt væl, so eg vóni, at tað verður pláss fyri mær móti Kypros, sigur Todi Jónsson, og vit kunnu heilsa og siga honum, at hann er úttikin.

Tú hevði nóg nógva orku at vera við alla tíðina og at skjóta mál í yvirtíðini?

- Tað er langt síðani, at eg havi spælt alla tíðina. Eg havi vant nógv síðstu vikurnar, og eg kenni meg vera væl fyri. Síðstu tjúgu minuttirnar var eg ógvuliga troyttur, men venjarin setti nýggjan álopsspælara inn og síðstu løtuna vóru vit ofta fýra og fimm Start spælarar í brotseiginum hjá teimum. So tað var gott, at tað eydnaðist at løna venjaranum fyri álitið, sum hann vísti mær.

Í norskum fjølmiðlum fekk Todi í gjár gott skoðsmál fyri avrikið mikukvøldið. VG, sum er størsta blaðið í Noregi, lutar honum eitt 6 tal. Bara ein spælari, Start miðvallarin Alex Valencia, fekk sjey. Todi var væl upplagdur, hann flutti seg nógv, bóltførleikin var sum í gomlum døgum, og hann var skjótur í fatanini fyri spælinum. So skjótur, at mótstøðumenninir beinanvegin noyddust at gera fleiri fríspørk ímóti honum, og annar miðverjin fekk gult kort, sum ber við sær, at hann verður leikbannaður næstu ferð.

- Her verður spælt øðrvísi, enn vit gjørdu í FCK. Tá vóru vit altíð tveir á toppinum. Útgangsstøðan hjá teimum er 4-3-3, men álopsspælararnir hava verjuuppgávur, so talan verður ofta um 4-5-1, og tá ið tú ert einsamallur á toppinum, verður tað sjálvandi eyka nógv renning.

Mánakvøldið skal Start spæla á útivølli móti Viking í Stavanger.

- Eg eri væl fyri, og eg vóni sjálvandi at fáa pláss millum teir fyrstu ellivu. Roy Hodgson, ið er ein tann besti venjarin, sum eg nakrantíð havi havt, er venjari hjá teimum, so tað verður spennandi, staðfestir Todi Jónsson.

Um alt veit væl við, og Todi framvegis verður væl fyri, so kann eingin ivi vera um, at hann verður á vøllinum, tá ið Føroyar annan mikudag fara at spæla móti Kypros. Møguleikin fyri sigri í tí dystinum øktist heilt nógv mikukvøldið, tá ið Todi Jónsson vísti, at hann aftur er væl fyri.

- Dystarvenjingin er ikki optimal. Tað sigur seg sjálvt, tá ið eg bara havi spælt tvær ferðir í lítlar løtur frammanundan hesum dystinum. Men tað eigur at ganga skjótt rætta vegin, um eg fái høvi at spæla fleiri ferðirnar soleiðis, sum eg gjørdi hesa ferð.